

*Bygdarhúsið í Haraldssundi var karmur um flokstingið hjá Tjóðveldi hesaferð. Hetta er fyrstu ferð, at floksting hevur verið hildið í Haraldssundi, tó at øll í bygdini, sum greiddu atkvøðu á fólkaatkvøðuni hin hin 14. september í 1946, atkvøddu fyri at loysa Føroyar frá Danmark*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Í kripputíðum sært tú hvørjir vinir tínir eru

**– Hjá flestu londum í Evropa gekk væl at koma burtur úr fátækradøminum. Vit gjørdust millum heimsins ríkastu, men tá ein tjóð er komin til ríkidømi, krevur tað styrki at umsita hetta. Hjá okkum sveik politikkurin, hugburðurin gjørdist skeivur, og neonkapitalisman gjørdist ómoralsk - og kanska gjørdust sjálvar umstøðurnar okkara størsti fíggindi, segði Steingrímur J. Sigfusson, íslendskur fíggjarmálaráðharri, á flokstingi hjá Tjóðveldi**

Vilmund Jacobsen

Tá Tjóðveldi helt floksting í Haraldssundi seinasta vikuskifti, hevði flokkurin bjóðað tveimum gestum at halda røðu.

Annar var Rói Patursson, ið er kendur sum skald og háskúlastjóri. Hin var íslendski fíggjarmálaráðharrin, Steingrímur J. Sigfusson.

Steingrímur greiddi frá, at hóast Íslendingar við stórum meiriluta gjørdu av at loysa frá Danmark í 1944 og skipa landið sum lýðveldi, fór Danmark ikki av landakortinum í teirra eygum fyri tann skuld.

– Danmark var har kortini, legði hann aftrat.

### Vinna á Danmark

Hann segði, at Danmark í tíðini eftir loysingina var ein týdningarmikil handilspartur hjá Íslandi, men sum tíðin leið, gjørdust onnur norðurlond ein alsamt størri partur av handilsliga samstarvinum.

Íslendski fíggjarmálaráðharrin var stundum álvarsamur, men hann skemtaði eisini. Hann var ikki komin langt í síni røðu, tá hann tók soleiðis til:

– Er tað nakað, sum íslendingar vilja, so er tað at vinna á Danmark í hondbólti, segði hann og brosaði.

Steingrímur J. Sigfusson segði, at tá ræður um frændalond, helt hann, at Føroyar eru á fyrsta plássi millum íslendingar. Síðan koma hini norðurlondini, men hann legði samstundis stóran dent á, at Póland hevði verið tað landið, sum virkuliga hevði víst seg frá síni góðu síðu, nú Ísland kom í stóra búskaparliga kreppu.

Hann segði, at Ísland hevði fingið stórt valutalán úr Pólandi, sum hann rópti tað – uttan nakrar treytir.

– Tað er í krepputíðum, at tú sært, hvørjir rættu vinir tínir eru, legði hann aftrat.

> **Hetta snýr seg um ábyrgd, og tað eigur ongantíð at vera trupult at gera tað, sum tú heldur vera rætt og neyðugt**
>
> STEINGRÍMUR J. SIGFUSSON

### Saman í útnorði

Steingrímur J. Sigfusson helt annars, at tey sambond í útnorði, sum Ísland hevur, í dag hava størri týdning enn nakrantíð áður, og í hesum sambandi kom hann eisini inn á arktisku økini, sum londini varða av.

– Tað hevur stóran týdning, at Føroyar, Ísland og Grønland samstarva, tí eingin ivi er um, at Norðuratlantshavið í framtíðini kemur at hava ein ógvuliga týðandi leiklut – ikki minst, tá ræður um tilfeingi.

Íslendski fíggjarmálaráðharrin, ið vísti seg at skilja rímiliga væl føroyskt, helt fyri, at tá tað ræður um frælsi og tjóðskap, hevði hann einki at leggja aftrat tí, sum Rói Patursson longu hevði sagt.

Hann tóktist hugtikin av framløguni hjá Róa.

### Úr fátækradømi

Íslendski fíggjarmálaráðharrin tosaði eisini um ta búskaparligu endurreisn, sum Ísland – og kanska eisini Føroyar – noyddust og noyðast ígjøgnum, nú londini rendu seg í svára kreppu.

Hann samanbar tó ikki støðuna hjá Íslandi við búskaparligu kreppuna í Føroyum, men vísti á, at hjá flestu londum í Evropa gekk væl at koma burtur úr fátækradøminum, sum var í gomlum døgum.

– Vit gjørdust millum heimsins ríkastu lond, men tá ein tjóð er komin til ríkidømi, krevur tað styrki at umsita hetta.

### Hugburðurin sveik

Steingrímur J. Sigfusson setti eisini spurningin, hví tað gekk so galið hjá Íslandi.

– Hetta hava vit tosað nógv um í Íslandi. Hvør var tað, sum sveik? Eg haldi, at tað í fyrsta lagi var politikkurin sjálvur sum veik. Hugburðurin gjørdist skeivur, og neonkapitalisman gjørdist ómoralsk - og kanska gjørdust sjálvar umstøðurnar okkara størsti fíggindi.

Fíggjarmálaráðharrin